SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Dagfesting: 08-06-2023

# UPPSLAG

## Burturbeining av <u>kloakkspillivatni</u> frá skipum

Sambært kunngerð nr. 123 frá 25. november 2005 og kapittul XXIV í Fráboðan frá Sjóvinnustýrinum B, D, E og F og sambært Fylgisskjal IV til altjóða MARPOL sáttmálan

<table>
<tr><td colspan="2">Kloakkspillivatn skal goymast umborð og avhendast til móttøkuskipan á landi ella burturbeinast sambært ásetingum niðanfyri</td></tr>
<tr><td>Skip størri enn 400 BT ella góðkend til fleiri enn 15 fólk<br><br>Burturbeining av kloakkspillivatni frá skipum, og havstøðum, er bannað, sbr. fylgiskjali IV til MARPOL sáttmálan, uttan so at:<br><br>1) kloakkspillivatnið er malið og sóttreinsað í góðkendari skipan, og burturbeiningin fer fram í minsta lagi 3 fjórðingar úr næsta landi; ella<br><br>2) kloakkspillivatnið verður burturbeint í minsta lagi 12 fjórðingar úr næsta landi. Verður kloakkspillivatn tømt úr kloakktanga skal hetta gerast meðan skipið siglir við í minsta lagi 4 fjórðingum um tíman; ella<br><br>3) Kloakkspillivatnið er viðgjørt í góðkendari skipan samb. IMO Resolutión MEP.159(55), og spillivatnið ikki gevur sjónliga slóð í sjónum; og<br><br>royndarúrslitið av skipanini er ásett í loyvisbrævinum um fyribyrging móti dálking frá kloakkspillivatni</td><td>Skip og bátar minni enn 400 BT í føroyskum/donskum sjóumveldi, umframt í Eystursjónum, ella góðkend til færri enn 15 fólk<br><br>Á føroyskum sjóumveldi er burturbeining av kloakkspillivatni bannað nærri enn ein fjórðing úr landi, uttan so at kloakkspillivatnið er viðgjørt í góðkendari skipan sambært reglunum galdandi størri skip<br><br>Toiletskipanir á skipum, ið sigla í omanfyri nevndum sjóøki, skulu uppfylla tey teknisku krøvini í ISO 8099 standardinum í útgávu, sum var galdandi á byggitíðspunktinum.<br><br><u>Viðm.:</u> Ávís linari krøv til toiletskipanir eru galdandi fyri varandi skip kjølstrekt fyri 27. september 2003 ella latin eigaranum sum nýbygt fyri 27. september 2006.</td></tr>
</table>